# Stuðulspolitikkur til mentanarstuðul frá Vestmanna kommunu

**Kapittul 1 - Endamál**

**§ 1**. Stuðulspolitikkurin er eitt amboð til viðgerð av stuðulsumsóknum til Vestmanna kommunu.

Endamálið við stuðulspolitikkinum er:

1. at lýsa, hvønn stuðul kann verða latin til,
2. at greiða frá, hvør tekur avgerð um stuðul.

**Kapittul 2 - Hvønn stuðul kann verða latin til**

**§ 2**. Stuðulin er í høvuðsheitinum ætlaður at stuðla mentanarligum tiltøkum og verkætlanum í Vestmanna kommunu.

**§ 3**. Felagsskapir, sum eru á fíggjarlóg landsins, fáa ikki stuðul frá Vestmanna kommunu.

**§ 4**. Felagsskapir, sum fevna um alt landið, fáa ikki stuðul frá Vestmanna kommunu.

**Kapittul 3 - Stuðul til mentanarlig endamál**

**§ 5**. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur kunnu søkja um stuðul til alment gagnligar framførslur, verkætlanir og líknandi, sum verða hildnar í Vestmanna.

**§ 6**. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur, sum búgva, eru uppvaksin ella eru heimahoyrandi í Vestmanna kommunu, kunnu søkja um stuðul.

**Kapittul 4 - Stuðul til námsferðir**

**§ 7**. Stuðulin á kr. 500 til námsferðir verður veittur næmingum, sum eru undir lesnaði, eftir fólkaskúlan, og sum búgva í Vestmanna kommunu.

**Kapitul 5 – umsókn um leigan av hølum**

**§ 8**. Listafólk, áhugafelagsskapir og onnur kunnu søkja um stuðul til leigan av hølum hjá kommununi.

**Kapittul 6 - Mannagongdir og freistir**

**§ 9**. Stuðulin er treytaður av, at ein fíggjarætlan fyri verkætlanina er viðfest. Um fyritreytirnar fyri eini játtan broytast munandi, kann kommunan gera av ikki at útgjalda játtaðan stuðul.

**§ 10**. Umsóknir um stuðul skulu verða kommununi í hendi í góðari tíð, innan peningurin skal nýtast. Umsóknir verða viðgjørdar á fundum hjá fíggjarnevndini.

**§ 11**. Umsóknir sambært kapittul 4 og 5 verða viðgjørdar av umsitingini sambært hesum leiðreglum.

**§ 12**. Stuðul til og við kr. 10.000 verður beinleiðis játtaður og avgreiddur av fíggjarnevndini. Stuðul yvir kr. 10.000 verður avgreiddur av bygdarráðnum eftir tilmæli frá fíggjarnevndini.

**Kapittul 7 – Játtaður stuðul**

**§ 13**. Stuðulin verður útgoldin eftir, at verkætlanin er framd, um ikki onnur avtala er gjørd.

**§ 14**. Stuðul fellur burtur eitt ár eftir, at hann er játtaður, um ikki onnur avtala er gjørd.

**Stuðulspolitikkur hjá Vestmanna kommunu samtyktur av bygdarráðnum 23.11.2023, við rættingum samtyktar av fíggjarnevndini tann 11. februar 2025.**

Sára

Sára Jógvansdóttir,
borgarstjóri